Skúlastýrisfundur 5. Februar 2026

Fundurin byrjar kl 17.00

Luttakarar: Theodor Eli Dam Olsen, Annita á Fríðriksmørk, Margith Lamhauge, Anna Maria Reinert Jensen, Elin Maria Ó. Olsen

Skrá:

Stjórin kunnar um sálarligt arbeiðsumhvørvi

- Mannagongd er gjørd í mun til sálarligt arbeiðsumhvørvi. Hon er eitt innanhýsis skjal, sum verður brúkt, tá starvsfólk boðar frá at tað hevur tað ringt.
- Spurningur verður settur við um mannagongdin er gjørd út frá tí hjá lærarafelagnum?
    - Vit hava ta mannagongdina, men hendan er gjørd út frá kunngerðini um sálarligt arbeiðsumhvørvi frá 2025
- Spurningur er um hon líkist mannagongdum um sálarliga arbeiðsumhvørvið hjá øðrum skúlum. Vit vita ikki um aðrar skúlar sum hava mannagongd um sálarligt arbeiðsumhvørvi.
- Vit fara framyvir at skula gera fleiri mannagongdir, men lærarar skulu inn yvir tað.
- Spurningur verður settur um lærarar hava trivnaðarkanningar. Tað er ikki altíð lætt at siga frá um man verður happaður av børnum.
    - Tað hava vit ikki praktiserað her. Vit hava starvsfólkasamrøður.
    - Uppskot er sett um man annaðhvørt ár skal gera trivnaðarkanning, og annaðhvørt starvsfólkasamrøður.
    - Av tí at tað ikki eru so nógv starvsfólk, kann vera lætt at gjøgnumskoða hvør er hvør, hóast spurnarkanningin er dulnevnd.

Mannagongdir, tá næmingar eru ólátaðir

- Ein skrokkur er gjørdur, sum lærararnir skulu byggja uppá.

Kunning um heildartiltak, sum verður á Argjahamri hósdagin

- Ein rød av heildartiltøkum hevur verið kring landið, soleiðis at allir skúlar kundu luttaka. Høvuðsevnið var Professionelli lærarin í nútímans samfelagnum. Hoyvíkar skúli luttók á skúlanum á Argjahamri.
- Lærarar valdu seg inn á verkstovur.

- Stórir bólkar av lærarum høvdu ikki mælt børnunum til at lisið til lærarar.

- **Annað**
    - Á námsfrøðiligum fundi varð tosað um at fáa ein felags fund við H71, FC Hoyvík, Skúlan við Løgmannabreyt fyri at betra um málburð og virðing í lokalsamfelagnum. Vit hava ein trupulleika við virðing í skúlanum, og vit meta at vit í felag kunnu skapa betri rammur um okkara børn og ungdóm.
        - Hugskot um at fáa Onnu Dam við á fundin.
        - Trygvi tosar við skúlastýrisforkvinnuna í SVL. Hetta verður tikið upp aftur á næsta fundi.
    - **Nýggjur Hoyvíkar skúli**
        - Bygginevndin skal vera Tróndur, Annita á Fríðriksmørk, Hermann Mortensen, Birita Wardum, Bergur Rask.
        - Áðrenn skúlastjóri og umboð fyri skúlastýrið kemur uppí bygginevndina, skal gerast upp hvussu man ger, arkitektakapping, hvussu nógvir pengar verða settir av.
        - Ætlanin er at bjóða Formanninum í skúlastýrinum, og Skúlastjóranum á fund.
        - Tosað verður um skúlin skal vera tvísporaður ella trísporaður
        - Hvar skulu vit vera, meðan skúlin verður bygdur.
            - Inni á Gøtu missa vit næmingar av Flat
            - Skulu vit í fleiri høli, verða trupulleikar við avlevering og um lærarar undirvísa í fleiri deildum.
            - Vit mugu finna eitt stað at vera.
        - Álitisfólkið hevur biðið um at senda boð um keðiligar hølisumstøður, at senda býráðnum.

Fundurin lokin kl 19:00.